# Uppskot: Veitarasáttmáli

**millum**
**Gjaldstovuna (kundin) og**
**xxxxxx, v-tal xxxxxxx (veitarin)**

| | |
|---|---|
| **Grundarlag** | Sáttmálin fevnir um uppgávur knýttar at menna samskifti og heimasíður á Gjaldstovuni.<br><br>Hesin sáttmálin, saman við útbjóðingartilfarinum, er grundarlagið undir samstarvinum. |
| | Kundin ger sáttmála við veitaran. Veitarin hevur bjóða fram fylgjandi starvsfólk: NAVN, NAVN, NAVN... |
| **Ábyrgdarhavandi av sáttmálanum** | Nicolai Mohr Balle hevur ábyrgdarhavandi leiklut fyri kundan og NAVN Á ÁBYRGDARPERSÓN er ábyrgdarhavandi fyri veitaran. Durita Hansen hevur samskipandi leiklutin fyri kundan. Fyri størri verkætlanir fer kundin at áseta ein navngivnan verkætlanarleiðara at umboða kundan. |
| **Uppgávur hjá veitarinum (veitingin)** | Talan er um samstarv, har veitarin verður partur av virkseminum hjá kundanum í sáttmálatíðarskeiðnum. Hetta merkir, at kundin ikki kann neyvt lýsa allar uppgávur, sum veitarin verður partur av.<br><br>Tó eru uppgávur, sum kundin hevur eyðmerkt:<br>• Dagføra samleikan hjá Gjaldstovuni. Núverandi samleiki er gamal. Hann hóskar ikki væl til talgilt samskifti og fevnir ikki um samlaða virksemið hjá okkum.<br>• Sum partur av dagførda samleikanum vilja vit menna eitt brand hiearaki. Gjaldstovan umsitur nógv virkisøki og veitir nógvar tænastur til stovnar, t.d. Landsnet, Skúlanet, Skjalhald og BSL. Veitarin skal luttaka í greining av hesum tænastum og gera uppskot til eitt brand hierarki, sum hóskar til virksemið á Gjaldstovuni.<br>• Gjaldstovan skal hava nýggja heimasíðu, sum skal verða ein høvuðssíða fyri øll virkisøki hjá Gjaldstovuni.<br>• Gera nýggja heimasíðu til keypsportal.fo. Gjaldstovan mennir umsitingarpartin av Keypsportalinum, har stovnar skráseta síni útboð. Hetta verður gjørt í BSL umhvørvinum. Veitarin skal menna ein útboðsportal, sum líkur nýtíðar krøv til CMS og talgilda atkomu. Veitarin skal leiða greiningar tilgongdina. Veitarin skal menna eitt API, sum samskiftir við back office.<br>• Dagføra snið á kt-veitingum saman við okkara mennarum, eitt nú Búskaparskipan Landsins og Billing skipanina hjá KT Landsins. Nógvar av okkara skipanum hava tørv á fáa eitt skarpari grafiskt snið, sum stuðlar undir brúkaravinsemi og atkomu.<br>• Framleiðsla av miðlatilfari til m.a. lýsingar, sosialar miðlar, uppseting av frágreiðingum, framløgum og brævpappíri.<br>• Gera sniðhondbók, sum lýsir okkara yvirskipaða snið og meginreglur |
| **Arbeiðstíð og -staður** | Arbeiðsstaður verður á Gjaldstovuni ella hjá veitara.<br>Møguligt skal vera at fáa fatur í Veitaranum umvegis telefon og teldupost í vanligari arbeiðstíð. |
| **Ognarrættur** | Kundin fær ognarskap av øllum sum veitarin framleiður til kundan, herundir imaterielle rettigheder. |

| | |
|---|---|
| **Góðska** | Tað verður væntað, at Veitarin loysir uppgávurnar á einum stigi, sum roknað kann verða við frá einum Veitara við tí bakgrund, útbúgving og royndum, ið Veitarin hevur, sambært tilboðinum. |
| **Tímatakstur** | Veitarin verður løntur fyri sítt arbeiði sambart tilboðnum xx kr<br><br>Prísvøkstur kann samsvara lønarvøkstrinum, tó ikki fyrsta árið. |
| **Tíðarnýtsla og aktivitetir** | Veitarin skrásetur dagliga tímanýtslu og førir sokallaða logbók fyri høvuðsaktivitetir. |
| **Fakturering** | Veitarin sendir kundanum rokning eina ferð um mánaðin, har skjalfesting fyri tímar í tíðarskeiðinum er hjáløgd.<br>Treytin fyri útgjaldið er, at krøvini til skráseting av tíðarnýtslu eru lokin, sí omanfyri.<br>Veitarin sendir talgildar fakturar mánaðarliga, í vanligum oio-xml formati.<br>Um fleiri verkætlanir koyra samstundis, so skulu hesar fakturerast hvør sær |
| **Trúnaður** | Báðir partar hava skyldu at viðgera vitan og tilfar um hvønn annan í trúnaði. |
| **Skyldur hjá kunda** | Kundin hevur skyldu at tryggja, at leiðsla og starvsfólk við hóskandi førleika viðvirka til, at<br>Veitarin kann loysa tær uppgávur, viðkomandi er settur at loysa.<br>Kundin hevur ábyrgd av at kunna viðkomandi partar og persónar um leiklutin hjá Veitaranum og tær uppgávur, sum avtala er gjørd um. |
| **Ræættindi til tað útinta** | Kundin fær øll rættindi, til tað sum er útint av Veitarinum í samband við hendan sáttmála, umframt øll rættindi til at víðarigeva, víðarimenna og broyta tað útinta, soleiðis sum kundin ynskir tað.<br>Tilfar, sum Kundin hevur útflýggjað Veitaranum, verður latið aftur, í seinasta lagi, tá ið sáttmálin fer úr gildi.<br>Kundin góðtekur at Veitarin kann varðveita upplýsingar og vitan, sum veitarin nýtir at menna egið virksemi, tó soleiðis at hetta ikki kompromitterar avtaluna um rættindi og trúnað. |
| **At siga sáttmálan upp** | Sáttmálin kann ikki sigast upp í sáttmálatíðarskeiðinum. Hinvegin kunnu partarnir semjast um at endað samstarvið um viðurskifti eru sum tala fyri tí. |
| **Mishald** | Við týðandi mishald av hesum sáttmála kann sáttmálin slítast.<br><br>Dømi um týðandi mishald eru um Veitarin:<br>- ikki maktar uppgávurnar<br>- Ikki veitir góðsku sambært tilboðnum<br>- ikki heldur avtalur |
| **Force majeure** | Vanligar reglur um force majeure eru galdandi fyri hendan sáttmála |
| **Ósemjur** | Tekur ósemja seg upp ímillum partarnar, sum ikki ber til at loysa beinanvegin, skal boðast til samráðingar millum stjórarnar hjá pørtunum.<br><br>Fæst eingin loysn í sátt og semju, verður trætan loyst við vanligum rættarmálið. Føroyskur rættur er galdandi. |
| **Gildistíð** | Sáttmálin kemur í gildi við undirskrift av báðum pørtum og er galdandi fram til og við xx.xx.xxxx. |
| **Optión** | Kundin kann leingja sáttmálan tvær ferðir 12 mánaðar (2 x 12). |

| | |
|---|---|
| **Uppathald** | Tá sáttmálatíðarskeiðið er runnið, skal veitarin handa kundanum alt kundin eigur rættindi til. |
| **Undirskrift** | Fyri kundan<br>Navn: Nicolai Mohr Balle Dagfesting: x.x 2025<br><br>Undirskrift: _______________________________________________<br><br><br>Fyri veitaran<br>Navn: xxxxxx Dagfesting: x.x 2025<br><br>Undirskrift: _______________________________________________ |